## Ófriðarligt vikuskifti



Sunnudagin kom harðskapurin í Libanon á eitt annað og enn meiri álvarsligari stig síðan 1990, tá ið libanska borgarakríggið formelt endaði. Hesaferð var libanski herurin uppií, tá ið átta mótmælisfólk doyðu undir ófriðinum – av hesum doyðu minst fýra shiamuslimar av byrsuskotum. Og hesin munurin kann gerast sera álvarsamur, tí herurin hevur frammanundan verið mettur at vera nevtralur í mun til ymsu bólkarnar í Libanon. Hendingarnar fóru fram undir mótmælisgongum í shiamuslimska býarpartinum av Beirut., mótmælt varð ímóti vánaligu streymveitingini í hesum sama parti av Beirut. Fremsta ensk mælta blaðið Daily Star skrivaði í vikuni, at sníkiskjúttar á høghúsum í økinum skutu eftir mótmælisfólkunum. Bara tveir dagar frammanundan harðskapin á gøtunum í Beirut lat ein løgregluovasti lív í eini bilbumbu. Hesin hevði ein týðandi leiklut í eftirkanningum av fleiri yvirgangsatsóknum, sum hava tikið lívið av fólkavaldum umboðum, týðandi fjølmiðlafólkum og nú síðan desembur ´07 tveimum hermonnum úr libansku trygdarherinum, ið nú eftir øllum at døma verður spakuliga drigin longur uppí stríðið.

# Libanski knúturin II – blóðdálkaður og stadnaður



**Sunnudagin í farnu viku gjørdist tað enn meiri sjónligt, at 15 ára langa borgarakríggið í Libanon ikki er farið afturum. Libanar hava ikki gloymt, hóast lítið og einki alment kjak hevur verið um kríggið gjøgnum 90ini og líka inntil morðið á fyrrv. forsætisráðharran Rafiq Hariri í 2005. Hesa tøgnmentan sær mann aftur í ymiskum bókmentum, t.d. í lærubókum hjá libanska fólkaskúlanum og miðnámsskúlanum**

## Miðeystur



**Johan Jacobsen**
johan@sosialurin.fo

Stutt eftir at eg var byrjaður sum lesandi á fróðskaparsetrinum í Keypmannhavn, vitjaði kendi libanski høvundurin Elias Khoury. Hann helt fyrilestur um skaldskap sín og um kynstrið at fortelja søgu. Hann tosaði serliga um týdningin í tí at skriva skaldskap á einum málið, ið varð sprottið úr gerandisdegnum – hetta fyri at viðgera týðandi viðurskifti, t.d. tabu o.líkn., ið eitt samfelag hevur at dragast við. Hetta gjørdi mann ikki í tí skaldskapinum, sum kom út í Libanon, metti Elias Khoury, og samstundis var hetta serliga ein eftirspurd mangulvøra í Libanon – eitt samfelag sett saman av fleiri smærri trúarsamfeløgum (søguliga eitt økið har minnilutabólkar leitaðu sær skjól) og eitt samfelag við einum 15 ára langum borgarakríggi í viðførinum. Eftir hansara meting kundi skaldskapur hava ein samfelagsligan leiklut við at fáa hol á libansku tøgnmentanin, ið lá yvir samfelagnum.

Hesin arabiski høvundurin, ið telist millum teir fremstu arabisku og hvørs flestu verk eru týdd til enskt, legði nevniliga eina týðandi staðfesting fram hendan fyrrapartin í seinnu helvt av árinum 2000: Libanon er ikki komið yvir borgarakríggið.

### Libanska tøgnmentanin - skúlaverkið

Gjøgnum tey meiri friðarligu 90ini hevur ein tøgnmentan ligið omaná almenna kjakinum. Libanar hava ikki verið á einum máli um at lýsa brogarakríggið, at tilluta ábyrgd og óheiðurligar leiklutir. Og frá almennari síðu hava sitandi politikarar og leiðarar valt ikki at tosa um ella viðgera kríggið. Evnið hevur verið ov eymt. T.d. hevur mann í lærubókum, hjá fólkaskúlanum og miðnámsskúlanum, lagt størstu áherðsluna á eitt sameint Libanon, har »lógin verður fylgd«, og hevur mann stórt sæð ikki umtalað borgarakríggið. Ein einfald orsøk er hon, at fleiri av politikarunum vóru virknir oddamenn undir sjálvum borgarakrígnum og tí hava teir ikki ynskt at fáa hetta fram.

Í Ta´ið Avtaluna frá 1990 (samtykt og skrivað í saudi arabiska býnum Ta´if) er m.a. ein partur um ungdóm og skúlaverkið. Her eftirlýsti mann nýtt lærutilfar til søgufakið og samfelagsligu fakini. Lærubøkur skuldu miðja eftir at styrkja um tjóðarskaparliga tilknýtið hjá næminginum til Libanon. Eisini skuldi mann finna eina semju í lærubókum til søgufakið og undirvísing annars, galdandi fyri alt samfelagið. Men í libansku eftirkrígstíðini eru tær flestu verkætlanirnar kollsigldar, tí partarnir í arbeiðinum hava havt ov ymisk sjónarmið um evnið.

Politikarar við avgerðunum hava í samsvari við tað statsliga ráðandi sjónarmiðið síðan 1990, hildið fast um, at áherðslan á libanska ymiskleikan við fleiri trúarsamfeløgum saman við fremmandari uppíblanding, er rótin til alt ónt; og tvs. borgarakríggið. Funnist hevur verið at frálærutilfarinum fyri at ganga alt ov lætt um sannleikan og so eisini ímóti honum. Atfinningarnar koma frá ymsum persónum